# Týskarum dámar føroyskt

Um nakrar vikur kemur fyrsta fløgan hjá ídnaðartekno bólkinum Side Effect út, men samstundis hava týdningarmiklar kreftir á týska teknomarknaðinum fingið eyga á unga havnarmannin, ið ger tónleikin hjá Side Effect




**TÓNLEIKUR**

*Niels Uni Dam*
*nieluni@sosialurin.fo*

Bynjolfur á Heygum hevur í nógv ár verið mettur, sum ein tann gávuríkasti ungi tónasmiðurin í Føroyum. Hann er maðurin handan løgini, ljómborðini og forritanina hjá Side Effect, Føroya einasta ídnaðar-tekno bólki.

### Myspace skapti sambond

Um nakrar vikur kemur fyrsta fløgan hjá Side Effect út, men løg av henni hava í fleiri mánaðar ligið á síðuni hjá Side Effect á portalinum myspace.com. Í hesum sambandi eru bæði bólkurin og Brynjolfur komin í samband við fleiri sera áhugaverd fólk. “Tað er, av onkrari orsøk mest týskarar, sum hava kontaktað okkum”, greiður Brynjolfur frá. ídnaðartekno, ella sokallaður industrial tónleikur er sera vælumtóktur í Týsklandi. Hetta er ivaleyst orsøkin til, at rættiliga fitt av týskarum dáma tónleikin hjá Side Effect.

### Hittar á gotiskur ídnaðartekno diskotekið

Tey fýra løgini Kaos, Burn, Fake Orgasm og Smiling Mask Preview hava fingið fleiri áhugaverd fólk at skriva til Side Effect. Eitt nú hevur týski tekno bólkurin Eternal Nightmare sett seg í samband við bólkin. Limirnir í Eternal Nightmare eru eisini plátuvendarar og hava tikið tónleikin hjá Side Effect niður av Myspace, og spælt hann á gotiska ídnaðartekno diskotekinum, har tey leggja tónleik á. Áhoyrararnir tóku sera væl ímóti løgunum hjá Side Effect. Tí bað Eternal Nightmare Side Effect um, at senda sær eitt eintak av fløguni hjá bólkinum, Brynjolfur brendi teimum eitt eintak, og sendi tað til Týsklands.

### Endurljóðblanda lag hjá Side Effect

Fløgan gjørdi ikki áhugan hjá Eternal Nightmare minni. Stutt eftir settu tey seg aftur í samband við Side Effect, og bóðu um loyvi at remixa lagið Fake Orgasm, hetta sloppu tey sjálvandi, greiður Brynjolfur frá.

Fólkini aftan fyri Eternal Nightmare eru somuleiðis í ferð við at geva eina fløgu út við ymiskum ídnaðartekno bólkum. Tey eru áhugaði í, at fáa Side Effect við á hesa fløgu.

Brynjolfur metur hetta vera sera spennandi. Tí týski marknaðurin er risa stórur í mun til tann føroyska. Í Føroyum er sera avmarkað hvørji støð Side Effect kann spæla, og tað er eingin ivi um, at dreymarnir hjá tónleikarunum í Side Effect røkka væl út um føroyska sjómarkið.

### Samstarv við Yluko

Men Eternal Nightmare er ikki einasti týski bólkurin, ið hevur latið oyruni upp fyri Side Effect. Y-LUK-O er eitt kent